# Taka gamlan tátt upp aftur

**Vælumtóktu fiskivinnutingini, sum vóru í áttatiárunum, verða nú tikin upp aftur**

FISKIVINNA
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** Tað er rættiliga stórur áhugi fyri at taka fiskivinnutingið uppaftur.

Í áttatiárunum var fiskivinnutingið eitt fast og ógvuliga vælumtókt tiltak, sum varð hildið í Norðurlandahúsinum einaferð um árið.

Tað var Karl Andreassen, sáli, ið var skrivari í Fiskivinnuráðnum, sum tók stig til at halda fiskivinnutingið og tey duttu eisini niðurfyri aftur við honum, tá ið hann fall frá. Tó hervði Vinnuhúsið eitt fiskivinnting aftur í nítiárunum.

Men hóast talan var um eitt ting, var talan um alt annað enn politikk, tí fiskivinnutingið var eitt slag av eini fakligari ráðstevnu, har har ymisk viðurskifti í fiskivinnuni vórðu lýst á fakligum støði.

Síðani tað datt niðurfyri, hevur áhugi verið at endurstovna tað aftur og serliga seinastu tíðina hevur tankin rættiliga fingið lív.

Og nú fiskivinnustevna er í Runavík, helt stýrisbólkurin fyri fiskivinnuroyndir, at tað var rætt at nýta hetta høvi at vita, um áhugi yvirhøvur er at endurreisa fiskivinnutingið.

Stýrisbólkurin heldur, at tað manglar eitt fakligt støði, har evni, sum fiskivinnan heldur hava týdning, verða tikin til viðgerðar og lýst nærri.

Og tað var Ásmundur Guðjónsson, sum er samskipari hjá stýrisbólkinum fyri fiskivinnuroyndir, varð biðin at lodda dýpið.

Tað gjørdi hann við at kalla saman til fundar umborð á Norrønu, nú hon liggur við bryggju í Runavík.

Hann hevði boðað øllum hugsandi myndugleikum, stovnum, feløgum og einstaklingum, sum hava við fiskivinnu at gera, frá fundinum.

Og tað vísti seg, at tey, sum halda, at saknur er í fiskivinnutinginum, hava gitt rætt, tí rættiliga nógv fólk var á fundi og haraftirat høvdu eisini nógv boðað frá, at tey stuðlaðu tankanum, uttan kortini at koma á fund.



*– Tað er neyðugt at geva altjóða rákinum um umhvørvisvernd og um, hvussu tilfeingið skal gagnnýtast eitt føryskt innihald. Tað heldur Ásmundur Guðjónsson kundi verið eitt gott evni á tikið upp á einum komandi fiskivinnutingi*

Og tað heldur Àsmundur Guðjónsson er neyðugt, tí tekur taka tey, sum hava áhuga í fiskivinnu, ikki undir við ætlanini, er grundarlagið tikið undan henni.

Fundurin umborð á Norrønu var mest at kalla eitt hugarok, uttan at nakrar avgerðir vórðu tiknar, men tað, sum liggur í kortunum, er, at fiskivinnutingið aftur skal vera eitt afturvendandi tiltak einaferð um árið.

Hvørji evni, tey komandu fiskivinnutingini fara at viðgera, veit hann heldur ikki, men tað kunnu so mong. Eitt nú heldur hann, at tað er neyðugt, at vit geva altjóða rákinum um umhvørvisvernd og um, hvussu tilfeingið skal gagnnýtast eitt føroyskt innihald, tí nú eru tað í stóran mun. umhvørvisfelagsskapir, sum seta treyitrnar og vit eru fyri tað mesta í verjustøðu.

### Høvdu stóran týdning

Ásmundur Guðjónsson sigur, at fiskivinnutingini høvdu stóran týdning fyri kjakið um fiskivinnuna, tí har vóru nógvir viðkomandi spurningir drignir fram

– Sostatt vóru tey eisini við til at hækka vitanarstøðið um okkara høvuðsvinnu og tey vóru eisini staðið, har teir ymsu partarnir í fiskivinnuni møttust undir óformligum umstøðum.

Hann sigur, at Fiskivinnuálitið, sum kom í 2000, umrøður eisini førleikamenningina í fiskivinnuni sum ein týðandi tátt í royndunum at menna fiskivinnuni.

– At endurstovna Fiskivinnutingið kann gerast ein liður í hesi menning.

Á fundinum umborð á Norrønu mikudagin, var eisini ein bólkur valdur, sum skal arbeiða víðari við hugskotinum og gera tilmæli um, hvørji evni kunnu takast upp o.s.fr.

Í bólkinum sita Ásmundur Guðjónsson, Rani Nolsøe, Jens Helgi Toftum og Áki Johansen.



# Tryggingin í góðum hýri

FISKIVINNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** Tað hevur verið rættiliga nógv virksemi á stóru, altjóða fiskivinnustevnuni, sum hevur verið í Runavík hesa vikuna.

Fyritøkur og stovnar, sum eru á stevnuni, royna sum frægast at vera blíð og lifra fyri viðskiftafólki sínum og royna at lokka nýggj viðskiftafólk til sín.

Og kann tað gerast betri enn við einum góðum bita og onkrum góðum afturvið? Tað vóru í hvussu so er mangar fyritøkur, sum gingu runt á stevnuni við smáum seðlum og bjóðaðu fólki bæði mat og drekka og tær innbodnu samkomurar hava verið nógvar og tættar á stevnuni, bæði umborð á Norrønu, aðrastaðni í Runavíkini og heima hjá fólki.

Eisini Tryggingarfelagið Føroya hevur verið í røttum stevnuhýri og stevnudagarnar bjóðaði hon viðskiftafólki sínum ókeypis kalt borð í hølum sínum í Runavík.

Tað vóru mong, sum tóku av- og alt tað góða, sum ongin fekk afturvið matinum um umborð á Norrønu, men sum summi siga er eitt avgjørt krav fyri at ein góð málttíð kann verða fullkomin, bjóðaði tryggingin eisini at skola tað kalda borðið niður við.

Og tað skerst ikki burtur, at tað vóru nógv, sum tóku av innbjóðingini hjá Tryggingarfelagnum.

Kanska eru Tryggingingar ikki so tvørar kortini, sum tær viðhvørt verða lagdar undir?



# Vil hava føroyingar til Hetlands at rokka

**Hetlendskur konsertfyriskipari og útvarpsvertur er so hugtikin at Gestum, sum vunnu Prix Føroyar, at hann vil sleppa at spæla teir í útvarpinum har**

FISKIVINNUSTEVNAN
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** ABCD og Ironically Maiden.

Tað skerst ikki burtur, at nøvnini fáa okkum at hugsa um tvey av allarstørstu tónleikanøvnunum seinastu árini.

ACDC og Iron Maiden hava havt mong løg á hittlistunum. Men hesi bæði, sum eita ABCD og Ironically Maiden eru tað, bretar nevna "Tribute Bands": Tey eru orkestur, sum royna at líkjast upprunaligu stórnøvnunum mest møguligt.

Og júst hevi bæði ensku "Tribute" -orkestrini verða tvey av høvuðsnøvnunum á eini rokk festival í Hetlandi í summar.

Í sambandi við fiskivinnustevnuna í Runavík, er Hetlendingurin, Marvin Smith, komin ta longu leið til Føroya at vera við á hetlendska básinum.

Og júst Marvin Smith er tann, sum fyrireikar konsertina.

Og hann vil fegin hava føroyingar at koma til Hetlands á rokkstevnu í summar.

Hetta er ein afturvendandi tiltak í Hetlandi at hava rokktónleikastevnu í Hetlandi og hon er í døgunum 19. og 20. juni, sum er fríggjakvøld og leygarkvøld.

Men tá ið ráðini ikki eru til at fáa upprunaligu orkestrini at spæla á stevnuni, mugu tey taka til takkar við eftirlíkninginum.

Men sambært Marvin Smith er tað heldur ikki so galið, tí hesi bæði orkestrini eru sera væl umtókt. tey eru von at spæla fyri stórum mannfjøldum.

Hann nevnir eisini at ABCD hevur vunnið eina kapping hjá tónleika sjónvarpsrásini MTV um at vera tað besta "tribute" orkestrið í Evropa.

Og teir gera nógv burturúr, tí teir fáa enntá eitt stórt ljóðanlegg líka úr Glasgow.

Sjálv stevnan verður í einum stórum ítróttarhøll í Lervick og atgongumerkini eru bílig, tey kosta bara 200 krónur fyri bæði kvøldini. Umframt hesi bæði høvuðsnøvnini, verða eisini orkestur úr Hetlandi við á stevnuni og hvørt kvøld verða eini trý, fýra orkestur á skránni og hann væntar, at teir føroyingar, sum koma á stevnuna, fáa eitt frálíkt vikuskifti.

Og tað skuldi ligið væl fyri, tí sum kunnugt, siglur Norrøna til Hetlands.



*Marvin Smith fyrireikar rokkstevnu í Hetlandi í Summar og hann vil fegin hava føroyingar niður at lurta. Her er hann inni á básinum hjá Sosialinum á fiskivinnustevnuni í Runavík*

### Vil spæla Gestir

Marvin Smith er ikki bara konsertfyrireikari.

Hann er eisini sjónvarpsvertur á BBC- Radio Shetland, har spælir hann nógvan tónleik. Og nú hann er í Føroyum, hevur hann eisini lurtað eitt sindur eftir føroyskum tónleik.

Og hann dylir ikki fyri, at honum dámar avbera væl Gestir, sum vunnu Prix Føroyar farna vikuskiftið.

Eg fari at royna at fáa fatur á tónleiki hjá Gestum, so eg kann spæla teir í útvarpinum í Hetlandi, sigur Marvin Smith.

Hann ætlar eisini at royna at fáa samband við konsertfyrireikarar í Føroyum at vita, um møguleiki er fyri samstarvi.

### Upplýsing er trupulleikin

Og nú vit høvdu ein hetlending hjá okkum, kundu vit ikki bara okkum at spyra hann, hvat hann heldur um tað, at tað ikki ber til at fáa ein litlan afturvið matinum umborð á Norrønu, ella ein sjuss í náttklubbanum um kvøldið.

– Tað, at onki er at drekka er ikki trupulleikin. Trupulleikin er, at vit ikki ikki fingu tað at vita tað frammanundan, hví tað er so. Trupulleikin er væntandi upplýsing. Vit eru ikki komin at drekka og trupulleikin er, at vit onki fingu at vita frammanundan.

# Hetlendingar sóknast eftir føroyskum samstarvsfeløgum

FISKIVINNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** Millum teir útlendingar, sum rættiliga høvdu brynjað seg út til fiskivinnuráðstevnuna í Runaví, vóru eisini hetlendingar.

Á einu felags bási høvdu ymsir stovnar og fyritøkur í Hetlandi sligið seg saman til at marknaðarføra teir møguleikar, sum vóru í Hetlandi, bæði innan ferðavinnu og aðra vinnu.

Kevin Moreland og Neil Hennderson á hetlendska básinum, halda, at góðir møguleikar skuldi verið fyri samstarvi ímillum Hetland og føroyar og eitt endamál hjá teimum er at vita, hvørjar vørur og tænastur, tað kundi komið upp á tal, at føroyingar keyptu úr Hetlandi og hvat tað kundi hugsast, at hetlendingar høvdu áhuga í at keypt úr Føroyum.

Hann sigur, at royndir eru gjørdar fyrr at menna samstarvið ímillum londini bæði, men tð hevur alt verið á hægri støði. Hesuferð ætla teir at royna seg við meiri beinleiðis sambandi frá virki til virki og hann sigur, at teir hava havt áhugaverdar samrøður.

Teir eru væl nøgdir við luttøkuna á fiskivinnustevnuni.

Ikki minst væntar hann, at ferðavinnan í Hetlandi fer at vera fyri framburði.

– Vit høvdu faldarar á føroyskum við okkum men teir vórðu rivnir burtur.

Hann heldur, at føroyingar eru ógvuliga áhugaðir í at fara til Hetlands, tí har kunnu teir uppliva eina øðrvísi mentan.

Og so heldur han ikki minst, at Norrøna kann geva hetlendsku ferðavinnuni eitt rættiligt skump framyvir.

Og so nevnir hann at enda, at hann hevur hoyrt, at nógvir føroyingar eru áhugaðir i at spæla gold og eisini tað hava teir góðar umstøður til í Hetlandi.....



*Kevin Moreland, hm og Neil Hendersen úr Hetlandi leita eftir samstarvi í Føroyum. Her hava teir hugt inn á básin hjá sosialinum og standa og kaga í internetsosialin*